## VIÐMERKINGAR

# Vælferð vs. Frælsi?

**(Aftursvar til viðmerking hjá Helga Abrahamsen til grein mína, "Sambandshugsjónin? ABC?")**

**Knút Eysturstein**



Eg má byrja við at siga, at tað er ikki eiti á ábyrgd, ið Helgi hevur lagt á mínar herðar! Í relativt stuttu viðmerking síni biður hann meg skriva eina grein afturat. Eina grein, har eg persónliga skal koma við einum ítøkiligum fíggjarligum uppskoti til, hvussu vit loysa Føroyar frá Danmark, og ikki minst hvussu og hvar vit skulu skerja í vælferðartænastum!

Eg fari hervið at takka Helga fyri álitið, men eg óttist samstundis fyri, at eg verði noyddur at skuffa hann! Tí eg eri hvørki samfelagsfrøðingur ella búskaparfrøðingur! Eg eri bert ein ungur maður, ið gjarna vil hava álit á teimum, ið stýra landinum! Á sama hátt sum eg havi álit á samfelagsfrøðingum, búskaparfrøðingum og øðrum serfrøðingum, ið virka í okkara samfelagi! Tað eru jú hesir serfrøðingar, ið gera uppskot til broytingar í okkara samfelagi, og ikki eg persónliga! Hinvegin krevji eg av okkara fólkavaldu politikarum, ið stýra landinum, at teirra ráðandi hugburður skal vera merktur av áliti og áræði! IKKI ótta og óhjálpsemi!

Greinin hjá mær hevði eitt heimspekiligt ástøði. Eg setti fram spurningar um álit og hugsjónir. Viðmerkingin hjá Helga hevur eitt fíggjarligt (materialistiskt?) ástøði. Hann setur fram spurningar um tøl og fíggjaruppskot. Hetta hongur ikki saman, og hevur - í einum kjaki - lítið við hvørt annað at gera! (Meir um hetta seinni í greinini).

**Spurningar og aftursvar**

Helgi ger sær í viðmerking síni nakrar tankar um, hvør spurdi hvat, og hvør svaraði hvørjum á valfundinum í Runavík á sinni. Fyri at gera alt eitt sindur greiðari fari eg her at endurgeva mínar spurningar og svarið hjá Helga enn einaferð.

Spurningarnir, ið eg setti Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, vóru tveir í tali. Tann fyrri var: *"Eru tað bara materiell virði,so sum pengar, bilar, sjónvørp og luksus, ið hava nakað at siga her í lívinum?"*

Tann seinni var: "*Hugsar nakar av tykkum um avleiðingarnar av tykkara boðskapi? Tað einasta ein fær at vita er, at vit duga einki! Vit kunna einki! Vit kunnu bara klára okkum við peningaligum stuðuli frá Danmark!"*. (eg endurgevi her so orðarætt sum yvirhøvur gjørligt).

Svarið hjá Helga Abrahamsen var: *"Sambandsflokkurin setur vælferðina hjá føroyinginum fremst. Eitt sindur av luksus afturat er fínasta slag"*.

Um hetta var eitt svar uppá annan ella báðar spurningarnar, skal eg ikki gera meg klókan uppá. Helgi sigur sjálvur, at svarið hjá honum hevði einki við mín spurning at gera, (!) og at eg havi sjálvur sett svar og spurning saman sum best ber til, og havi síðan "kóka súpan burturúr". Nú fari eg at útgreinað fyri tær, Helga, hvat ið var sakt á fundinum, og hvør niðurstøðan er:

A) Eg spyrji: *"eru tað bara materiell virði,so sum pengar, bilar, sjónvørp og luksus, ið hava nakað at siga her í lívinum? Hugsar nakar av tykkum um avleiðingarnar av tykkara boðskapi? Tað einasta ein fær at vita er, at vit duga einki! Vit kunna einki! Vit kunnu bara klára okkum við peningaligum stuðuli frá Danmark!?"*
B) Helgi svarar: *"Sambandsflokkurin setur vælferðina hjá føroyinginum fremst. Eitt sindur av luksus aftrat er fínasta slag"*.
C) Aftursvarið er sera ógreitt. Tískil er niðurstøðan onnur av tveimum:

Niðurstøða 1: Helgi hevur misskilt spurningarnar og velur tí at koma við einum floskli ístaðin (sum ein rættur politikari)
Niðurstøða 2: Helgi metir materiel virði, vælferð og luksus at vera eitt feitt og heldur at hetta er tað, ið gevur lívinum innihald.

Tá ein stillar upp sum valevni fyri politiskan flokk, og førir seg fram á valfundi, so má ein eisini takað avleiðingarnar av orðunum, ið ein ber fram!

Eg vil annars leggja aftrat, at orð ið vóru borin fram á veljarafundi 15 januar í Runavík neyvan hava tann stóra framhaldandi áhugan hjá lesaranum, so kanska áttu vit at steðga her.

**Fullveldi vs. vælferð?**

Helgi sigur seg dáma partar av míni grein. Men so sigur hann eitt sum ikki passar, og tað er, at eg sigi bart út, at fullveldið hevur størri týdning enn vælferðin hjá føroyingum. Eg veit ikki hvar tú lesur tað, men tað stendur ikki skrivað í míni grein. (Síggja tit, Helgi dugir eisini at kóka súpan!).

Helgi skrivar soleiðis í síni viðmerking: *"Mær dámar altíð væl, tá loysingarfólk opið og erliga viðurkenna, at føroyingar kunnu ikki bæði hava vælferð og fullveldi, og tí mugu velja annað av hesum"*. Hvør sigur, at vælferð og fullveldi eru tveir mótpólar, ið ikki kunnu samantvinnast? Hvør sigur, at vit mugu ofra annað fyri at fáa hitt? Eg vildi mett, at fyri ein stóran part av føroyska fólkinum er fullveldið tað sama sum vælferð! Tað, at vit sjálvi ráða í egnum landi og taka ábyrgd av egnum avgerðum, er fyri mong tann sanna vælferðin!

Persónliga haldi eg, at hugtakið "vælferð" kann merkja so ómetaliga nógv! Vælferð er nakað, sum einstaklingurin tulkar fyri seg sjálvan. Vit raðfesta og virðismeta øll ymiskt her í lívinum. At Helgi Abrahamsen og Sambandsflokkurin royna at tulka fyri okkum og fortelja okkum, hvat vælferð er, er bara syrgiligt! (eg veit væl, at "vælferð" og "vælferðarsamfelag" eru sosialdemokratisk slagorð í politiskum høpi, men hetta undirstrikar bert hvussu nógv ein kann slíta og misnýta orð!).

**Hugsið tykkum um!**

Eg fari at biðja Helga Abrahamsen og Sambandsflokkin um at hugsa seg betri um, næstu ferð hann ella onkur annar setur fram krøv í bløðunum. Næstu ferð tit biðja um fíggjarlig uppskot, vendið tykkum so til røttu serfrøðingarnar í fíggjarviðurskiftum, og ikki til ein ungan mann, ið bert hevur eitt málsligt studentsprógv at vísa á (og áðrenn tit koma við einum "jamen hvat veitst tú so um hesi viðurskifti?" argumenti, skulu tit minnast til, at um fíggjarserfrøðingar eru teir einastu, ið kunnu kjakast um frælsi, vælferð og hugsjónir, so kann eingin av okkum siga nakað sum helst!). Eg eri annars vísur í, at okkara serfrøðingar í fíggjarmálum kunnu geva tykkum góð ráð og hjálp til bæði eitt og annað, skattalættar íroknað!

**Vilja vit?**

Annars viðvíkjandi frælsinum, vælferðini og hugsjónunum, so dugi eg í grundini ikki at síggja, hvar trupulleikin er. Hví ræðast vit so ómetaliga illa tankan um at skula ráða í egnum landi? Hví er tað so ræðandi at hava álit á sær sjálvum og hvørjum øðrum? Hví er tað so ræðandi, um vit sum einstaklingar og sum tjóð seta okkum eitt mál? Hví er tað so ræðandi, um hetta málið inniber, at vit ein dag fara at gjalda sjálvi? At vit ein dag fara at hava ábyrgd av okkara landi? At vit ein dag fara at hava evsta vald í Føroyum?

Alt, sum vit menniskju byggja, skapa og menna, byrjar við viljanum. Uttan vilja koma vit ongan veg. Vit mugu hava vilja til vælferð, vilja til frælsi, vilja til fullveldi, vilja til ábyrgd, vilja til broyting, vilja til sjálvi at kunna velja. Vilja vit?


## Starvsfólk
### til Ferðslutrygd

Søkt verður eftir fólki til hálvtíðarstarv – við møguleika fyri øktari arbeiðstíð.

Hevur tú hugflog og dugir tú at seta ætlanir í verk, er hetta júst rætta starvið til tín.

Tú skal megna at taka tær av uppgávum frá byrjan til enda; heilt frá hugskoti til ætlanin er framd. Tú skal duga væl at leggja til rættis, hava ans fyri smálutum og tora at siga tína hugsan. Tað er eisini alneyðugt, at tú hevur góðan málsligan førleika, bæði í skrift og talu. Eins sjálvsagt er, at tú hevur góðan førleika at nýta teldu.

Royndartíðin er tríggjar mánaðir, og starvið fyribils galdandi eitt ár. Starvstíðin byrjar sambært avtalu.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til ***Jón Kragesteen, leiðara, á tlf. 310204***.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og starvsroyndir, skulu vera okkum í hendi ***í seinasta lagi 1. mars 2004***.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**
Yviri við Strond 21 · 100 Tórshavn
Tlf. 310204 · Faks 310979
www.rff.fo · rff@rff.fo


### Minningarorð um
## Emil Fróða Olsen

**20. desember 1974 19. desember 2003**



Tung vóru boðini at fáa um at okkara kæra sysktkinabarn, Emil, ikki var ímillum okkum longur.

Emil hevði fylt 29 ár tann 20. desember og skuldi halda føðingardagin saman við familju og vinum, men hvør skuldi trúð, at tann dagurin skuldi haldast heima hjá Jesu pápa.

Tað er svárt hjá okkum, at hann ikki er millum okkum longur. Við tárum í eygunum og alíkavæl kunnu vit smílast, tí vit minnast Emil, sum hann var. Altíð í góðum lag og spjaddi gleði har sum hann var. Hann vil altíð í okkara hjørtum verða goymdur og ongantíð gloymdur, tí vit eiga nógv góð minnir eftir hann.

At Emil átti nógvar góðar vinir, sóu vit sum tollaksmessudag fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Jólini komu eisini hesaferð, hóast tey vóru øðrvísi enn vanligt og sjálvt um vit bert høvdu hug at sita í sorg okkara, so gongur lívið víðari, og sum vit vita, so lekur tíðin sár.

Vit vilja enda við orðunum, sum høvdu so nógv at týða fyri Emil, og vilja hervið lýsa frið yvir minnið um Emil Fróða Olsen, Toftir.

*Í friði eg vil bæði leggjast og sovna*
*tí tú Harri meg letur búgva í trygdum einingi*
Sálmur 4,9

Góða Turið mostir, Óli, Annika og Jerry, Herit og Sigmund v/ fam. og Inga Maria, má Harrin styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

Heilsan

**Systkinabørnini**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Dávur Juul Magnussen:

# Lokið LRSM prógv í trombon

**Dávur Juul Magnussen, 18 ára gamal og úr Havn, hevur lokið LRSM prógv í trombon við framúr úrsliti. Heitið LRSM stendur fyri Licentiate of the Royal Schools of Music og er ein yrkisførleiki, sum vanliga verður rokkin eftir trý ára lesnað á einum bretskum tónlistaháskúla**



*Leiðarin í Musikkskúlanum, Bo Isholm, handar her Dáva Juul Magnussen prógvið*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Sum viðurkenning fyri hansara góðu evni og hansara arbeiðsinnsats hevur Tórshavnar Musikkskúli valt at lata Dáva fáa ein peningastyrk upp á 4.400 krónur fyri útreiðslurnar í sambandi við LRSM próvtøkuna.

Dávur er fyrsti næmingur úr Føroyum, sum hevur roynt eina so høga yrkisførleika útbúgving, meðan hann gongur í skúla (viðm. hann er studentaskúlanæmingur). Hann er nú skikkaður at undirvísa á einum og hvørjum musikkskúla, um hann ynskir tað.

Dávur hevur spælt trombon í minni enn seks ár, nú hann lýkur hetta prógvið, og tað ger úrslitið so mikið meira merkisvert. Henda próvtøka var eitt náttúrligt framhald fyri Dáva, eftir at hann sum fyrsti føroyski næmingur vann gullheiðursmerki í Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence í 2002.

Dávur hevur ein dreym um at gerast yrkis trombonspælari, og hansara næsta stig verður at gera av, hvar hann skal taka hesa útbúgving, sum hann ætlar at fara undir í september 2005. Ongland, USA og Danmark verða roknað sum møgulig lestrarstøð.

Dávur er sonur Randi Juul Magnussen og Magnus Paula Magnussen í Hoyvík.

### Minningarorð um
### mín góða vinmann
## Høgna á Borg



Eg var staddur heima tann 2. desember 2002, vit bæði Hjørdis sótu og hugnaðu okkum í stovuni eftir at hava lagt børnini, tá telefonin ringdi - tað var Heini í hinum endanum, eg skal so siga "halló Heini hvat sigur tú fyri gott". Áðrenn eg fái sagt setningin liðnan, letur úr Heina, "nú er Høgni farin",eg flúgvi upp úr sofuni, tí hetta klári eg ikki at taka sitandi - meðan tankarnir og minnir alt ísenn mala í høvdunum, og eg skilji púrt einki av hesum, tí Høgni kann ikki verða farin for dekan!!! Hyggi síðan at Hjørdis, ið hevur varnast álvaran í hesi samrøðu og situr og hálvgrætur.

Alt hetta kvøldið og náttina við komu minnir fram í huga mínum - eitt fyri og annað eftir, líka frá tí fyrsta degi tá tú kom í okkara skúlaflokk og til tað síðsta kvøldið, stutt áðrenn tú andaðist. Tá vit høvdu vitjan av tær, har vit sótu langt út á náttina og tosaðu um nýggjar og gamlar dagar.

Eg minnist fyrstu samrøðuna vit høvdu, tað varð tann morgunin tú sum 12-13 ára gamal byrjaði í okkara flokki, og eg skuldi verða eitt sindur blíður fór so yvir at tosa við henda nýggja floksfelaga og spurdi "skalt tú byrja í okkara flokki?, og tú svaraði við tíni "spydiheit", nei eg skal byrja í tykkara flokki, og tað legði støðið, har vit dámdu væl at arga og arbeiða uppá hvønn annan, ið til tíðir fór út um mark.

Eftir loknan fólkaskúla í 1987, ið hvørgin av okkum orkaðu fyri, starvaðust vit saman hjá Danberg, har vit vóru við til at umvæla SMS, tað varð ein góð tíð.

Í 1988 fór tú í læra á Tórshavnar skipasmiðu, og eg byrjaði í starvi á Strandfaraskipum Landsins, vit høvdu tó dagligt samband og fylgdust nógv fram til 1992. Um hetta mundið fórt tú niður til Danmarkar á skúla og nakað eftir at arbeiða, og tískil sóust vit ikki so ofta sum áður, tó so tú kom forbí av og á, tá tú var í nánd. Men ikki kan sigast tað sama um meg, eg var alt ov sjáldan forbí hjá tær tíðarskeiðið frá 1992 til 1998, og tað lætst tú meg altíð fáa at vita, men tað fekk eg bøtt upp á, tey síðstu árini tú var á lívi.

Tað sum eg minnist einamest er ein hending fyri stuttari tíð síðan, tá eg spurdi teg um tú vildi standa faddur til dóttur mína, og tú ovfarin og týðuliga rørdur spurdi um eg meinti tað.

Høgni var sera skemtingarsamur, spoyskur og ein lívsnjótari sum fáur, og eg eri sera glaður fyri, at eg kom at kenna hann. Hvíl í friði.

**Bogi í Gil (Abrahamsen)**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at okkara elskaða dóttir, móðir, omma, vermamma,
systir, svigarinna, mostir og ommusystir

**Marjun Tórhalla Rmeih**
fødd Weihe

ættað úr Tórshavn, andaðist á Hvidovre Sjúkrahúsi
22. februar, 61 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Nordre Kapel, Vestre Kirkegård
26. februar kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Eli og børnini v/ familju**

## Tøkk

Vit vilja við hesum veita øllum tykkum
eina stóra tøkk, sum mintust til okkum, tá okkara
elskaða kona, mamma, vermama og omma

**Randi Heinesen**

andaðist og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til tykkum allar á B7,
fyri tykkara stóru umsorgan
og til Martin og Berg prest, fyri troystarrík orð.
Takk til tykkum á Ellisheiminum, bygdarhúsið
og bygdarfólkið í Tjørnuvík
fyri tykkara stóru hjálp. Ein tøkk til tann stóra
mannaskara, bæði í kapellinum og Tjørnuvíkar kirkju
og øll tykkum, sum við blómum, kransum og gávum
til Krabbameinsfelagið mintust hana.
Guð signi tykkum øll

**Hans Esbern**

## Tøkk

Eg takki tykkum øllum, bæði innan- og uttanlands, sum mintust til mín á 80 ára føðingardegnum.

*Vinarligar heilsanir*
**Símun P. Poulsen**

### Dagurin

**26. februar. Ingigerð.** Kanska navn á franskari prinsessu, Ingardis, ið vit annars einki vita um. Navnið hevur fingið norrønan form, ið merkir *tann av guðinum Ing varda.*

*Janus Djurhuus føddur hendan dagin í 1881.*